gult cyan magenta svart



# ÚF og SvF verða hvør sær

*Hóast landsstýrismaðurin í mentamálum í vikuni setti Jógvan Jespersen, sum fyribilsstjóra í SvF, til nýggjur stjóri er funnin, so merkir tað ikki, at stovnarnir verða lagdir saman*

*Hóast Jógvan Jespersen fyribils er stjóri á báðum stovnunum er ikki ætlanin at leggja ÚF og SvF saman*



Jógvan Jespersen er tann rætti maðurin at leiða SvF í skiftistíðini. Hann hevur leitt ÚF gjøgnum kreppuárini og tað hevur hann gjørt væl. ÚF hevur ikki havt hjálp fyri neyðini og tað er eitt tekin um, at tað er arbeitt við skili, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Sveinur Tróndarson

Tvær fyritøkur, tveir stjórar sum hvør í sínum lagi hava ábyrgdina fyri rakstrinum mótvegis landsstýrismanninum. Á leið soleiðis er støðan í dag og nøkunlunda soleiðis verður hon eisini framyvir.

Tað sigur Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í mentamálum, um støðuna hjá Útvarpinum og hjá Sjónvarpinum.

Orsøkin til at stovnarnir báðir eru komnir í andglettin er, at Tróndur Djurhuus segði seg úr starvi, og at Jógvan Jespersen fyribils er settur í hansara stað.

## Ikki lagdir saman

Tað er ikki ov nógv sagt, at SvF hevur verið í brennideplinum í langa tíð. Fíggjarliga støðan hjá stovninum var beinleiðis orsøkin til at landsstýrismaðurin mátti leggja frá sær, og í longri tíð hevur verið spurt, um hetta ikki eisini skuldi fáa avleiðingar fyri stjóran eisini.

Tað fekk tað ikki. Stjórin varð sitandi og sum skilst, so hevur hann vent fíggjarligu gongdini soleiðis at SvF nú er rættiliga væl koyrandi.

Tí kundi hann eisini fara við røttum ryggi væl vitandi, at eftirmaður hansara ikki kemur til eina fíggjarliga søkkandi skútu. Og sambært landsstýrismanninum var tað ein skilagóð ger.

- Eg haldi, at Tróndur hevur valt tað røttu loysnina, sigur Tórbjørn.

- Hann hevur tikið fulla ábyrgd fyri hallinum í 1998 og 1999, men hann hevur eisini víst hegni til at venda gongdini. Nú kundi hann fara við góðari samvitsku, hóast tað sjálvandi er missur fyri SvF, tí hann er góður journalistur, sigur landsstýrismaðurin.

## Skulu hava stjóra

Tá landsstýrismaðurin hevði fingið uppsøgnina var bara eitt at gera. Tað er stjórin, sum hevur ábyrgdina av rakstrinum mótvegis landsstýrismanninum, og tí var einki annað at gera enn at finna ein egnaðan mann.

- Niðurstøðan var, at Jógvan Jespersen er tann rætti maðurin at leiða SvF í skiftistíðini. Hann hevur leitt ÚF gjøgnum kreppuárini og tað hevur hann gjørt væl. ÚF hevur ikki havt hjálp fyri neyðini og tað er eitt tekin um, at tað er arbeitt við skili, sigur Tórbjørn Jacobsen.

Eitt annað, sum landsstýrismaðurin hevur lagt dent á er, at útvarpsstjórin umframt at arbeiða í ÚF, eisini hevur arbeitt í sjónvarpinum, so hann kennir stovnin innanífrá.

- Men hetta er ein millumloysn, leggur landsstýrismaðurin afturat.

Spurdur um tað er skilagott, at SvF fær ein stjóra, sum eisini er stjóri á øðrum stovni frammanundan sigur landsstýrismaðurin, at so verður hann bara noyddur til at arbeiða eitt sindur meira hetta tíðarskeiðið.

- Eg rokni nú heldur ikki við, at Jógvan er bangin fyri at taka eitt eyka tørn eitt styttri tíðarskeið, so í tí síggi eg ongan vanda. Annars eru stovnarnir soleiðis uppbygdir, at ábyrgdin er býtt út á deildarleiðararnar og tað trúgvi eg ikki at hann fer at broyta, sigur landsstýrismaðurin, sum hevur eina neyva ætlan við SvF og ÚF.

## Almennar fyritøkur

Tá løgmaður bar fram løgmansrøðuna segði hann, at ætlanin er at endurskoða lógina um kringvarp, sum nú hevur virkað í góð tvey ár.

Endamálið við at endurskoða lógina um kringvarp er, at broyta bygnaðin soleiðis, at ÚF og SvF verða broytt til tveir sjálvstøðugar almennar fyritøkur við professionellari nevnd, sum kemur at hava alla ábyrgdina av fyritøkunum.

- Í veruleikanum er talan um at gera miðlarnar til vanligar »almennar« fyritøkur. Sum í privata vinnulívinum skal nevndin hava ábyrgdina av fyritøkuni, og tað verður stjórin, sum skal hava ábyrgdina mótvegis nevndini. Hetta verður gjørt fyri at slíta stovnarnar, sum hava stóran týdning, burtur frá politisku skipanini á øllum økjum, sigur landsstýrismaðurin.

Men hetta skal viðgerast áðrenn og tað er ætlanin at fáa frá hondini í heyst. Tá tað er yvirstaðið, og bygnaðarligu broytingarnar komnar upp á pláss, tá kann søkjast eftir nýggjum stjóra.

- Til ta tíð, kemur Jógvan Jespersen at verða stjóri í báðum stovnunum við ábyrgd mótvegis landsstýrismanninum, sigur Tórbjørn Jacobsen.

---

*Jógvan Jespersen, stjóri og stjóri:*

# – Ein fyribilsloysn

*- Eg dugi ikki at síggja nakran vanda í hesum, serliga tí, at talan er um eina fyribilsloysn. Ætlanirnar hjá stovninunum eru longu lagdar og tað farið eg ikki at leggja meg út í, sigur nýggi stjórin í SvF*

Sveinur Tróndarson

Jógvan Jespersen er annars eitt sindur varin við at siga nakað sum helst hesar fyrstu dagarnar, tí hann hevur heilt einfalt ikki fingið stundir at seta seg nóg nógv inn í alt enn.

Men sum skilst, so hevur hann sagt ja, tí landsstýrismaðurin hevur lagt eina við, at tað er ætlanin at halda fast við, at talan skal verða um tveir stovnar — ella fyritøkur, sum ætlanin er at gera tað til.

Men er ikki vandi fyri at hann gerst hálvur í báðum støðum, tá hann á henda hátt skal verða stjóri í tveimum stórum fyritøkum?

- Tað dugi eg ikki at síggja vandan í. Stovnarnir koyra sum vælvirkandi eindir, hvør í sínum lagi. Tað merkir, at nógvar avgerðir verða tiknar úti á teimum ymsu deildunum, uttan at eg yvirhøvur eri við inni í myndini. Soleiðis er tað nokk eisini í SvF, og tað verður ikki broytt bara tí at eg komi har, sigur Jógvan Jespersen.

Hann leggur dent á, at hann fer ikki at kollvelta øllum mannagongdum í SvF nú hann er vorðin stjóri har, og at hann fer ikki at leggja seg út í valið av evnum til sendingarnar, tí ta uppgávuna hava onnur.

- Eg skal — við ábyrgd yvirfyri landsstýrismanninum — hava ábyrgdina av, at raksturin til ein nýggjur stjóri verður settur, sigur Jógvan.

Onkur heldur kanska at hann á henda hátt fær innlit í »loynidómar«, sum SvF brúkar í kappingin móti Útvarpinum, men soleiðis sær hann tað ikki. Hinvegin heldur hann, at SvF kann fáa gagn av, at hann er stjóri í einum stovni, sum hevur hórað undan kreppuárini, tí hann umsitingarliga hevur verið væl fyri.

- Tað kundi verið, at SvF fekk okkurt burtur úr tí ístaðin, sigur hann og leggur afturat, at verður tað úrslitið, so er tað gott.

Í báðum stovnunum er tað so, at deildirnar hava ábyrgd fyri sínum øki, og í tí sambandi hava tær eisini fíggjarliga ábyrgd. Hetta er eisini ein orsøk til, at nýggi stjórin ikki heldur, at tær stóru broytingarnar skulu gerast. Leiðin er løgd fyri langari tíð síðani, men tað er upp til hansara at halda eyga við at alt hongur saman tá til stykkis kemur.

---

*Deildarleiðarar í SvF:*

# – Eitt skilagott val

**- Hatta er so avgjørt ikki tað ringasta valið, sum landsstýrismaðurin kundi gera, og onkur skal verða stjóri, sigur Øssur Winthereig, tíðindaleiðari í SvF, í sambandi við, at Jógvan Jespersen er settur sum fyribilsstjóri í SvF**

Sveinur Tróndarson

- Tað sum umræður er, at hyggjarin hevur álit á, at tað, sum verður víst á skíggjanum er valt av SvF. Hyggjarin skal ikki sita við eini kenslu av, at tað er nýggi stjórin ella ÚF sum avgerð, hvat kemur á skíggjan frá SvF.

Tað sigur tíðindaleiðarin í sjónvarpinum, Øssur Winthereig, nú útvarpsstjórin eisini er settur at vera ovasti leiðarin í hinum loftmiðlinum. Lógin sigur, at onkur skal verða stjóri á stovninum og hava ábyrgdina mótvegis landsstýrismanninum.

- Til ta uppgávuna er Jógvan valdur, og hatta er so avgjørt ikki tað ringasta valið, sum landsstýrismaðurin hevur gjørt, sigur Øssur.

Eins og starvsfelagarnir í ÚF, so dugir Øssur ikki at síggja nakran vanda fyri at nýggi stjórin fer at leggja seg út í dagligu arbeiðsgongdirnar í SvF. — Redaktionellu og programpolitisku avgerðirnar vera tiknar í SvF, sum tær altíð hava verið tað, og stjóraskiftið fer ikki at hava við sær, at SvF fer at hugsa um ÚF tá avgerðir verða tiknar. Sjálvandi ikki, sigur tíðindaleiðarin í SvF.

- Fíggjarliga er stovnurin við at koma upp á pláss, og um ársskiftið er stovnurin fíggjarliga sera væl fyri. Tróndur hevur vent fíggjarligu gongdini soleiðis at stovnurin nú er vælkoyrandi. Tí fer stjóraskiftið í hesum føri heldur ikki at hava broytingar við sær í slíkum føri, sigur Øssur at enda.

Tað eru tó ikki øll, sum eru so tíðindafróð, sum Øssur. Leiðarin á mentadeildini hjá SvF, Ivan Niclasen, staðfestir bara, at útvarpsstjórin er settur í starv. – Landsstýrismaðurin hevur sett útvarpsstjóran sum fyribilsstjóra hjá okkum, og tað taka vit til eftirtektar, sigur hann.

---

*Deildarleiðarar í ÚF:*

# – Eingin trupulleiki her

**Deildarleiðararnir í ÚF duga ikki at síggja nakran vandi við, at teir nú skulu deila stjóran við SvF. — Vit hava eitt arbeiðsbýti, sum ger, at stjórin ikki alla tíðina er við í dagliga arbeiðinum og tí fara vit ikki at merkja stórvegis til, at hann eisini skal hava ábyrgdina av SvF, sigur Jóhan Mortensen, tíðindaleiðari**

Sveinur Tróndarson

Jóhan sigur, at arbeiðsbýti í útvarpinum hevur við sær, at tað so at siga bara er tá okkurt serligt er á vási, at stjórin verður tikin við upp á ráð, so tí fara starvsfólkini í ÚF ikki at merkja nakað til nýggja starvið hjá Jógvani.

- Stjórin leggur seg ikki út í dagliga raksturin av deildunum. Ta ábyrgdina hava deildarleiðararnir. Vit hava fundir og leggja ætlanir, sum vit greiða honum frá, men hann leggur seg ikki út í málini. Hann verður sjálvandi tikin við upp á ráð tá stórmál eru, tí tað er hann, sum hevur endaligu ábyrgdina, men ikki til tað dagliga, sigur Jóhan.

Tí dugir hann ikki at síggja tað, sum ein trupulleika, at Jógvan Jespersen er settur fyribilsstjóri í SvF.

- Eg kundi hugsað mær, at arbeiðsbýtið er tað sama í SvF, sum her, og tað merkir, at ábyrgdin eisini er býtt út á ymsar herðar, sum so aftur svara til stjóran.

Tá tað er sagt, so heldur tíðindaleiðarin í útvarpinum, at eingin ivi er um, at útvarpsstjórin hevur førleikan til at vera stjóri í sjónvarpinum. Hann hevur megnað at føra útvarpið ígjøgnum kreppuárini, uttan at stovnurin hevur verið fyri fíggjarligum bakkasti, og so hevur hann eisini arbeitt í SvF.

- So tað sigur seg sjálvt, at hann veit hvat tað snýr seg um, sigur Jóhan.

Tíðindaleiðarin fær fullan stuðul í meting síni frá umsitingarleiðaranum, sum er vísur í, at teirra stjóri hevur førleikan til at loysa uppgávuna.

gult cyan magenta svart



stephanssons hús 31 42 91




Eimskip heintar vøruna kring alt Evropa og í Føroyum standa 30 starvsfólk til reiðar at taka í móti, og flyta tær vøruna heilt fram til dyrnar. Ring og fá nærri at vita á 31 97 97.